# Hvussu stýrdu Føroyar gjøgnum Covid-19 kreppuna?

## Ein eftirmeting



LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Hvussu stýrdu Føroyar gjøgnum Covid-19 kreppuna?**
Ein eftirmeting

**Útgivið:** 9. januar 2023

**Útgevari:** Løgmansskrivstovan

**Útgáva:** 1. upplag, 150 eintøk

**Verkætlanarleiðari:** Rógvi Olavson

**Málslig gjøgnumgongd:** Sprotin

**Sniðgeving:** VIRKA

**Myndir:** Ólavur Frederiksen og Bjarni Árting Rubeksen

**Kápumynd:** Flaggdagur 2020 (Ólavur Frederiksen)

**Prent:** Føroyaprent

Talgild útgáva og tilhoyrandi ískoytispartur kann takast niður av heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni. Verður frágreiðingin endurgivin, skal vísast til útgávuna.

# Samandráttur

Covid-19 kreppan er mest umfatandi heilsukreppa, sum heimurin hevur sæð í nógv ættarlið. Milliónir av menniskjum doyðu av farsóttini, og hon kollvelti samfeløg og lívið hjá fólki kring heimin. Kreppan var fleirdimensjónell, torskild, broyttist ofta og kravdi sostatt sera nógv av stýrandi myndugleikum.

Føroyska Covid-19 kreppan vardi í tvey ár frá mars 2020 til februar 2022. Hon var samansett av sjey smittubylgjum og nøkrum tíðarskeiðum millum bylgjurnar, tá ið lítil smitta var. Kreppan kostaði føroyska landskassanum góða hálva milliard kr. í 2020 og 2021. Føroyska Covid-19 kreppan kann eisini býtast í tvey tíðarskeið, sum eru eitt sindur ymisk, hvat stýring viðvíkur. Fyrra tíðarskeiðið, frá mars til mai 2020, er stutt, og merkt av ótryggleika, tí farsóttin er ókend, og seinna tíðarskeiðið er langt og merkt av, at myndugleikar fleiri ferðir seta ferðina upp og niður. Hetta seinna tíðarskeiðið er merkt av minni ótryggleika og tí, sum fleiri hava nevnt "dansin við koronu".

Føroyar kláraðu seg væl gjøgnum Covid-19 kreppuna, um vit samanbera við onnur lond. Hetta kunnu vit byggja á tríggjar sannroyndir:

1. At fá fólk doyðu av sjúkuni í Føroyum,
2. at kreppan ávirkaði í minni mun gerandislívið hjá fólki í Føroyum enn aðrastaðni, og
3. at hugburðurin hjá almenninginum gjøgnum at kalla alla kreppuna var, at tiltøkini hjá myndugleikunum vóru hóskandi.

Kortini hevur tað stóran týdning at hyggja neyvari at, hvussu stýringin í Føroyum eydnaðist, og tí er henda eftirmetingin gjørd. Høvuðsendamálið, umframt at skjalfesta, hvat hendi, er at nágreina, hvat virkaði væl, og hvat virkaði minni væl við føroysku Covid-19 handfaringini, hvat hava vit lært, og hvat kann gerast betur eina aðra ferð. Høvuðsparturin av eftirmetingini er gjørdur við støði í 37 hoyringarsvarum frá teimum stovnum, fyritøkum og feløgum, sum høvdu mest við Covid-19 handfaringina at gera.

Heilsufaklig sjónarmið sluppu veruliga til sín rætt undir kreppuni. Tey blivu ein dagligur og avgerandi partur av almenna orðaskiftinum og høvdu sera stóran týdning fyri politisku stýringina gjøgnum alla kreppuna. Yvirhøvur var greið, skjót og hóskandi almenn upplýsing sera týdningarmikil og minkaði um iva, ótta og tvístøður, sum annars høvdu kunnað stungið seg upp.

Føroyar høvdu størri kanningarorku samanborið við fólkatalið enn flestu onnur lond. Hetta bleiv avgerandi, tí her bar til at halda fast í eini avbyrgingarstrategi, meðan nógv onnur lond steðgaðu við hesum. Eisini sermerkti tað føroysku stýringina, at stýrt varð við tilmælum heldur enn við lógum. Hesum lata tey flestu av teimum spurdu væl at, tí tilmæli loyvdu einum ávísum smidleika í ítøkiligu handfaringini. Hinvegin kundi tað á summum økjum vera torført at tulka og seta tilmælini í verk. Viðgjørt eigur at verða, um tað er eitt gott hugskot við eini rammulóg til líknandi kreppur í framtíðini.

Hóast stýrt varð í høvuðsheitum við tilmælum, vórðu fleiri lógir gjørdar beinleiðis orsakað av farsóttini. Her verður millum annað víst á byrjanaravbjóðingar við hjálparpakka 1, sum skuldi gera tað møguligt at rinda lønir hjá heimsendum starvsfólkum. Eisini verður víst á løgfrøðiligar avbjóðingar av, at lóggivið var afturvirkandi, at lóggáva gekk út av sær sjálvum, at víðar heimildir vóru givnar landsstýrisfólkum at áseta reglur í kunngerð, og at fyrireikingararbeiðið var stutt, og stundir ikki vóru at senda lóggávu til ummælis.

Eldraøkið fylti nógv, tá ið kreppan byrjaði, tí Covid-19 var skjótt eyðmerkt sum sjúka, ið var vandameiri fyri eldri borgarar og fyri fólk við ringari heilsu.

Her verður víst á, at tað var ein trupulleiki, at eldraøkið ikki hevði umboð í farsóttarnevndini. Kortini vóru nógvar mannagongdir gjørdar at verja eldraøkið og onnur øki, sum varða av útsettum borgarum. Av tí sama kundu borgarar/búfólk ikki fáa vitjan í longri tíð, sum var torført hjá teimum, teirra avvarðandi og hjá viðkomandi starvsfólkum.

Covid-19 kreppan hevði við sær, at ymiskt virksemi á stovnum, fyritøkum og feløgum, sum ikki var alneyðugt, mátti skerast burtur fyribils, so at dentur kundi leggjast á kjarnuvirksemi. Hetta hevði við sær, at nógvar tænastur versnaðu í tíðarskeiðnum. Fyri ávísar stovnar hevði kreppan við sær, at ávíst virksemi øktist sera nógv. Á heilsuøkinum máttu starvsfólk renna væl skjótari enn vanligt.

Føroyar høvdu eina sera kringa og liðiliga skipan. Tað vil siga, at skipanin var før fyri at laga seg til umstøðurnar sera skjótt, og skipanarligu mørkini vóru ikki líka avmarkandi sum í størri skipanum uttanlands. Starvsfólk og leiðslur dugdu væl at laga seg til nýggja gerandisdagin, og alt samstarv og samskifti øktist munandi. Kreppan hevði við sær munandi førleikamenning, virðismiklar royndir og betraðar mannagongdir, sum framvegis verða brúktar, ella sum kunnu setast í verk í serligum støðum.

Hóast hesar positivu avleiðingar, so hevði kreppan eisini negativar avleiðingar fyri starvsfólkatrivnað á fleiri økjum, serliga fyri front-line starvsfólk. Tey avrikaðu nógv, arbeiðsbyrðan var sera stór, sálarliga arbeiðsumhvørvið var ikki nøktandi, og fleiri vórðu rakt av strongd. Í summum førum merktust avleiðingarnar væl eftir kreppuna. Trivnaðurin gjørdist ikki frægari av, at fleiri arbeiðspláss mangladu starvsfólk, sum kravdi uppaftur meir av verandi starvsfólkum.

Á undirvísingarøkinum var størsta avbjóðingin at røkka øllum næmingum og lesandi við fjarundirvísing. Í fólkaskúlunum var hetta torført, tí ymiskt var, hvussu nógv varð gjørt burturúr í heimunum. Munurin millum ressursusterkar og -veikar familjur gjørdist sjónligari. Hinvegin upplivdu allir skúlarnir fyrimunir av styttri tímatalvum, eitt nú at næmingar vóru meira motiveraðir, tímarnir blivu effektivari o.s.fr. Á miðnámi vóru eisini avbjóðingar við fjarlestri. Her verður víst á, at fjarundirvísing verður ongantíð líka góð sum undirvísing á staðnum. Eisini verður víst á, at kreppan gekk út yvir sosiala lívið hjá næmingunum. Summi eru enn merkt av ringu byrjanini í 2020. Niðurstøðan er, at relatiónir millum næmingar og lærarar og næmingarnar sínámillum eru avgerandi fyri læringina.

Covid-19 kreppan hálaði teppið undan ávísum vinnuligum virksemi, millum annað ferðavinnu og listarligum virksemi. Hetta hevði stórar fíggjarligar avleiðingar fyri tey, sum starvaðust innan hesar vinnur. Í ferðavinnuni vóru nógv søgd úr starvi, og innan listaøkið steðgaði alt útinnandi virksemi upp, tí tað bar ikki til at hava framførslur og framsýningar. Tey, sum arbeiddu fulla tíð sum listafólk vóru serliga hart rakt.

# Covid-19 í Føroyum

Covid-19 kreppan er mest umfatandi heilsu- og samfelagskreppa, sum heimurin hevur sæð í fleiri ættarlið. Nógv fólk lótu lív, og afturat hesum komu likamligar, sálarligar, sosialar og fíggjarligar avleiðingar. Tað var nærum ógjørligt at rokna út, hvat fór at henda, sum gjørdi politiska stýring sera torføra.

Sambært heimsheilsustovninum WHO er hálvsjeynda millión fólk deyð av sjúkuni og av ymisku frábrigdunum av upprunaliga virusinum. Farsóttin kollvelti eisini samfeløg og lívið hjá fólki kring allan heimin og hevur havt avleiðingar av ymiskum slag fyri milliónir av menniskjum.

Kreppan var av einum slag, sum flest allir myndugleikar óttast mest. Talan var um fleirdimensjonella hóttan, sum var ómøgulig at skilja til fulnar. Atferðin hjá sjálvum virusinum var torfør at rokna út. Avleiðingarnar av smittuni vóru ógreiðar. Flytføri og útbreiðslan av smittu var stór og sostatt eisini torfør at fyribyrgja. Hvørja ferð granskarar og myndugleikar høvdu lært eitt sindur um sjúkuna, kom eitt nýtt frábrigdi, sum bar seg øðrvísi at. Tekniskar loysnir til avbjóðingar av heilsuligum, sosialum, búskaparligum og politiskum slag vóru ikki tøkar frá byrjan og máttu uppfinnast til ymisk høvi sum frá leið. Í flestu londum, eisini í Føroyum, var hugburðurin hjá almenninginum skiftandi til serlig átøk og galdandi tilmæli.

Tá ið vit komu longur inn í kreppuna, gjørdist greitt, at ymisku avleiðingarnar av kreppuni og av neyðugu smittustýringini vóru ókendar. Kreppan ávirkaði heilsuliga, millum annað við langtíðarárinum av virusinum (long-covid), og við tað at farsóttin seinkaði viðgerð av øðrum sjúkum.

Kreppan ávirkaði eisini sálarliga og sosialt, millum annað við at eldri sum yngri vóru meira avbyrgd gjøgnum longri tíðarskeið. Og so ávirkaði kreppan eisini fíggjarliga, við tað at hon rakti fleiri vinnubólkar meint.

Ógreiðu og skiftandi umstøðurnar undir Covid-19 kreppuni elvdu til høvuðbrýggj hjá myndugleikum um allan heim. Sum niðurlendski forsætisráðharrin Mark Rutte tók til, máttu myndugleikar taka 100% av avgerðunum við 50% av upplýsingunum.[1] Henda støðan var ofta eisini galdandi í Føroyum, hóast Føroyar hava verið millum tey lond, sum hava havt lutfalsliga góða vitan um smittuútbreiðslu og annað orsakað av stóru kanningarorkuni.

Kreppan kostaði nógv hjá føroyska landskassanum, tilsamans góða hálva milliard kr. í 2020 og 2021 (sí Talvu 1 á næstu síðu).

1 Boin, A., Overdijk, W., Van der Ham, C., Hendriks, J. & Sloof, D. (2020). Covid-19: *Én analyse van de nationale crisisrespons.* Crisis University Press. (s. 42) [ensk umseting tikin úr Boin, A., McConnell, A. & 't Hart, Paul, (2021) *Governing the Pandemic – The Politics of Navigating a Mega-Crisis.* Palgrave Macmillan.]

| Covid-19 átøk | 2020 | 2021 | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Farsóttartilbúgving, koronukanningar, koppsetingar og fyribils koronudeild | 52.094 | 100.293 | 152.387 |
| Koronukanningar, gjald frá ferðandi | - 5.563 | - 24.007 | - 29.570 |
| Arbeiðsmarknaður | 28.001 | 6.305 | 34.306 |
| Herundir frá ALS | 128.500 | | 128.500 |
| Hjálparpakkar til vinnulív og mentan | 152.021 | 52.223 | 204.244 |
| Hjálparpakkar til almennar stovnar og virksemi | 26.720 | 4.600 | 31.320 |
| **Tilsamans** | **381.773** | **139.414** | **521.187** |

**Talva 1** Yvirlit yvir koronuútreiðslur 2020-2021 (tús. kr.).
Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Ein so álvarslig kreppa eigur at verða eftirmett. Covid-19 kreppan er ein søgulig hending, og tí er hon eitt gott høvi at fáa innlit í, hvussu politiska stýringin virkar og ber seg at, tá ið samfelagið er undir sera stórum trýsti. Tað er eyðsæð, at lond, sum høvdu dygdargóða tilbúgving framman undan kreppuni og skilagóða stýring gjøgnum kreppuna, eisini hava klárað seg best gjøgnum hetta avbjóðandi tíðarskeiðið.

Hetta skjalið hugsavnar seg um, hvussu stýringin gjøgnum kreppuna hevur eydnast. Hóast Føroyar eru millum tey lond, sum eru komin frægast gjøgnum kreppuna, so er endamálið við eftirmetingini at læra av hesum serstaka og kollveltandi tíðarskeiði og at leggja upp til eitt kjak um, hvussu vit skulu handfara kreppur í framtíðini.

## SJEY SMITTUBYLGJUR

Føroyska Covid-19 tíðarskeiðið vardi frá februar 2020 til februar 2022. Í hesum tíðarskeiðnum vóru seks smittubylgjur, áðrenn sjeynda bylgjan, Omikron, rakti í september 2021 (sí Mynd 1).

Covid-bylgjurnar í Føroyum vóru merkisverdar, við tað at smittutølini øktust sera skjótt, men minkaðu síðani eisini sera skjótt aftur. Fyrsta bylgjan rakti í mars 2020, tá ið sjúkan var ókend, og tá ið óttin í samfelagnum var størst. Kreppustýring varð sett í verk um alt landið, og alt samfelagið fór niður í ferð. Frá mai 2020 fór samfelagið inn í eitt tíðarskeið við lítið og einki av smittu. Hetta vardi til beint eftir ólavsøku 2020, tá ið bylgja 2 rakti. Bylgja 3 rakti stutt eftir, í september-oktober 2020, men var væl minni enn bylgja 2. Bylgja 4 kom um ársskiftið um sama mundið, sum fyrstu koppingarevnini komu til landið. Eftir hetta kom longsta tíðarskeiðið við lítið og einki av smittu. Hetta vardi frá januar til mai 2021, tá ið bylgja 5 rakti. Smittutølini minkaðu aftur, men vuksu síðani aftur í juli mánaði við bylgju 6.




**Mynd 1** Tær seks bylgjurnar áðrenn Omikron, grundað á talið á "smittaðum í løtuni" frá mars 2020 til august 2021.
GG: Omikron bylgjan, sum byrjaði í september 2021, er ikki við í myndini.

Omikron, sum var bylgja 7, vardi frá september 2021 til februar 2022, tá ið myndugleikarnir góvust við at telja nýggjar tilburðir. Omikron-bylgjan var væl øðrvísi enn hinar. Í bylgju 1, 2 og 6, sum vóru tær álvarsligastu framman undan Omikron, var talið á smittaðum, tá ið bylgjan rakti hámarkið, ávikavist 102 (23. mars 2020), 138 (13. august 2020) og 115 (14. juli 2021). Tá ið omikron-bylgjan rakti hámarkið tann 31. januar 2022, vóru 4.893 fólk skrásett smittað. Omikron var sostatt væl meira smittandi enn øll undanfarin frábrigdi av Covid-19. Samstundis hevði Omikron við sær yvirhøvur mildari sjúkugongd fyri flestu smittað enn undanfarin frábrigdi. At Omikron háttaði sær so nógv øðrvísi er samstundis orsøkin til, at henda seinasta bylgjan ikki er við í myndini omanfyri. Toppurin hevði verið so høgur, at hann hevði skeiklað myndina.

Tað ber eisini til at býta kreppustýringina sundur í tvey rættiliga ymisk tíðarskeið. Fyrra tíðarskeiðið er fyrstu tveir mánaðirnar eftir, at smittan var komin til landið, tá ið alt landið fór niður í ferð, og seinna tíðarskeiðið er, tá ið landið fyrst læt upp aftur, men helt fram við at smittustýra frá mai 2020, til smittustýring og uppteljing formliga steðgaði í februar 2022. Hesi tíðarskeið eru ymisk, hvat stýring viðvíkur. Fyrra tíðarskeiðið frá mars til mai 2020 er stutt (2 mðr.) og merkt av, at farsóttin er ein nýggj og óunnilig hóttan. Seinna tíðar-skeiðið frá mai 2020 til februar 2022 er lutfalsliga langt (22 mðr.) og merkt av, at farsóttin er betur kend, og at tamarhald er á støðuni fyri tað mesta, tó ikki altíð. Í fyrra tíðarskeiði er stýringin merkt av, at samfelagið er meira ella minni í undan-taksstøðu, og tí er stýringin lutfalsliga einføld og eintýðug. Í seinna tíðarskeiðnum fer samfelagið fleiri ferðir upp og niður í ferð, alt eftir hvussu stór hóttanin er. Hetta hevur við sær, at stýringin er torgreiddari enn í fyrra tíðarskeiðnum, og at munandi meira kjak er í samfelagnum um, hvat er rætt og skeivt í sambandi við tilmæli og stýring. Hetta seinna tíðarskeiðið er, sum fleiri hava málborið seg, ein "dansur við koronu".

# Tíðarlinja

## 2020

**4. mars** Fyrsti tilburður
**12. mars** Samfelagið niður í ferð
**18. mars** Hjálparpakki 1 samtyktur í løgtinginum
**23. mars** Fyrsta bylgja í hæddini (102 smittað)
**6. apríl** Hjálparpakki 2 samtyktur í løgtinginum
**8. mai** Føroyar koronafríar. Upp aftur í ferð
**19. juni** Hjálparpakki 3 samtyktur í løgtinginum
**30. juni** Kravdar kanningar við markið. Kanningarorkan veksur. Afturat Heilsufrøðiligu Starvsstovan kannar Thetis eisini fyri Covid-19
**7. august** 4.882 kanningar eitt samdøgur, sum er met fyri 2020
**13. august** Onnur bylgja í hæddini (138 smittað)
**30. september** Triðja bylgja í hæddini (35 smittað)
**30. desember** Koppseting byrjar – fjórða bylgja í hæddini (62 smittað)

## 2021

**5. januar** Fyrsti persónur doyr av Covid-19
**24. januar** Alpha frábrigdið staðfest í Føroyum
**23. mars** Føroyar aftur koronufríar
**11. mai** Ein triðingur av fólkinum koppsett tvær ferðir
**29. mai** Fimta bylgja í hæddini (48 smittað)
**11. juni** Koppsetingin setur met við 7028 prikum í eina viku
**21. juni** Delta frábrigdið staðfest í Føroyum
**24. juni** Helvtin av fólkinum koppsett tvær ferðir
**14. juli** Sætta bylgja í hæddini (115 smittað)
**1. august** Krav um kanning við markið slept
**3. november** Nýggj tiltøk fyri at tálma vaksandi smittu. 4233 kanningar í ein dag, sum er met fyri 2021
**8. desember** Omikron staðfest í Føroyum

## 2022

**14. januar** Børn kunnu koppsetast
**17. januar** 5.208 kanningar í ein dag, sum er met fyri alt koronatíðarskeiðið
**21. januar** Løgmaður boðar frá exit strategi og stigvísari avtøku av tilmælum
**31. januar** Omikron (sjeynda) bylgjan í hæddini (4.893 smittað); kanningar við markið steðga
**1. og 15 februar** Fleiri tilmæli linkað
**28. februar** Øll koronatilmæli avtikin og Covid-19 kreppan av í Føroyum. Triggir fjórðingar av øllum føroyingum koppsettir tvær ferðir

JANUAR · FEBRUAR · MARS · APRÍL · MAI · JUNI · JULI · AUGUST · SEPTEMBER · OKTOBER · NOVEMBER · DESEMBER


Covid-19 Kanning
Covid-19 Testing

## ALTJÓÐA SAMANBERING

Føroyar eru millum tey lond, sum komu frægast gjøgnum Covid-19 kreppuna. Hesa niðurstøðuna kunnu vit byggja á tríggjar sannroyndir:

1 At fá fólk doyðu av sjúkuni í Føroyum samanborið við onnur lond.

2 At samfelagið, tess virksemi og gerandislív hjá borgarum var lutfalsliga lítið ávirkað av farsóttini.

3 At borgarar gjøgnum meginpartin av kreppuni hildu, at tilmælini vóru hóskandi.

Størsta avbjóðingin hjá øllum londum undir kreppuni var at javnviga, hvussu nógv farsóttin skuldi sleppa at gera um seg í mun til, hvussu nógvar avmarkingar smittustýringin legði á borgararnar. Skuldi stýringin forða fyri tilburðum og harvið andlátum, var neyðugt at leggja fleiri avmarkingar á virksemið og gerandisdagin hjá borgarunum. Hinvegin, skuldi virksemið í samfelagnum ikki ávirkast av farsóttini, var vandi fyri fleiri tilburðum og harvið andlátum. Punkt 1 og 2 omanfyri vóru sostatt gjøgnum alt Covid-19 tíðarskeiðið í øvugtum sambandi hvørt við annað. Ein raðfesting var at verja mannalív fyri Covid-19, men tað var eisini ein raðfesting at hava gongd í samfelagsvirksemi. Ov strong stýring kundi sostatt hava aðrar avleiðingar fyri samfelagið, trivnaðin og búskapin. Hetta setti myndugleikarnar í eina tvístøðu, sum merkti stýringina ígjøgnum alt tíðarskeiðið.

Fyrsta punkt, andlát, er sjálvsagt týdningarmikið, tí tað sigur nakað um, hvussu væl stýringin megnar at verja mannalív fyri farsóttini. Mynd 2 niðanfyri vísir kumulativ andlát orsakað av Covid-19 frá mars 2020 til februar 2022. Í Føroyum eru 28 fólk skrásett deyð *av* ella *við* Covid-19, sum svarar til 518 deyð fyri hvørja millión íbúgvar. Veikleikin við hesum hagtalinum er, at tað er torført at skilja ímillum, nær Covid-19 er høvuðsdeyðsorsøkin, og nær fólk eru deyð við Covid-19, men har ein onnur høvuðsdeyðsorsøk ger seg galdandi. Við hesum fyrivarni kunnu vit kortini staðfesta, at flestu onnur lond hava nógv fleiri andlát í mun til íbúgvatal, enn Føroyar hava størsta partin av kreppuni. Í sambandi við andlát hevur ringast staðið til í Bretlandi og USA, har 3.000 fyri hvørja millión hava latið lív av farsóttini. Hetta merkir,
at tað hevur verið seks ferðir meira sannlíkt at doyggja av (ella við) Covid-19 í hesum londum enn í Føroyum.

Omikron var eitt serliga smittandi frábrigdi av Covid-19, sum breiddi seg nógv skjótari enn undanfarnar útgávur. Samstundis varð skjótt greitt, at hetta frábrigdið var mildari enn tey undanfarnu. Sostatt er sannlíkt, at tá ið hetta frábrigdið gjørdi um seg frá seint á heysti 2021, var parturin av deyðum *við* Covid-19 størri, enn hann var undan Omikron. Hetta kann lutvíst vera grundin til, at kurvan kvinkar uppeftir hjá flestu londum móti endanum av tíðarskeiðnum.

Føroyar síggja eisini út til at hava staðið seg væl, tá ið hugt verður at yvirnormalum andlátum. Seinasta frágreiðingin hjá Nordregio, "State of the Nordic Region 2022", vísir, at øll Norðurlond uttan Noreg og Føroyar skrásettu eitt yvirnormalt (excess) tal á deyðum í 2020.[2] Í Føroyum doyðu í miðal 401 fólk frá 2015 til 2019. Í 2020, tá ið eingin koppseting var tøk, og farsóttin harvið var mest hættislig, doyðu 365 fólk í Føroyum. Hinvegin doyðu fleiri fólk í 2021 enn miðal fyri 2015-19. Einki bendir tó á, at hesin vøksturin kemur av Covid-19.

Annað punkt, hvussu nógv gerandisdagur og virksemi er ávirkað av farsóttini, hevur eisini stóran týdning, tí tað sigur nakað um, hvussu væl stýringin hevur megnað at varðveitt eitt vanligt lív og týdningarmikið virksemi hóast truplu umstøðurnar. Tað ber til at grundgeva sannførandi fyri, at Føroyar eru millum tey londini, sum hava verið minst ávirkað av kreppuni, tá ið hugsað verður um virksemið og gerandisdagin hjá fólki.

2 Nordregio (2022) "State of the Nordic Region 2022."




**Mynd 2** Kumulativ andlát fyri hvørja millón íbúgvar.
Kelda: Johns Hopkins University. Fingin til vega frá ourworldindata.org.
Gev gætur, at lond hava ymiskar mannagongdir at staðfesta deyðsorsøkir.
Tí er ikki vist, at myndin vísir neyvt, hvussu ofta Covid-19 er høvuðsdeyðsorsøk.

| | Deyð um árið í miðal fyri 2015-2019 | Deyð í 2020 | Deyð í 2020 í mun til miðal fyri 2015-2019 (%) | Deyð í 2021 | Deyð í 2021 í mun til miðal fyri 2015-2019 (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 53,566 | 54,645 | 2 | 57,142 | 7 |
| Finnland* | 53,723 | 55,488 | 3 | 56,035 | 2 |
| Ísland | 2,251 | 2,301 | 2 | 2,325 | 3 |
| Noreg | 40,750 | 40,611 | 0 | 41,693 | 1 |
| Svøríki | 90,962 | 98,124 | 8 | 88,906 | 0 |
| Føroya | 401 | 365 | -9 | 407 | 1 |
| Grønland | 499 | 520 | 4 | 525 | 5 |
| Áland | 271 | 291 | 7 | 261 | -5 |
| **Tilsamans** | **242,152** | **252,054** | **4** | **247,033** | **2** |

**Talva 2** Yvirnormal andlát í Norðurlondum 2020 og 2021.
* Finsku tølini íroknað Áland.
Kelda: Nordregio (2022) "State of the Nordic Region 2022." Tølini eru frá norðurlendsku hagstovunum.




**Mynd 3** Strangleikavísari í sambandi við Covid-19 stýring.
Kelda: Oxford Covid-19 Government Response Tracker, Blavatnik School of Government, University of Oxford.
Fingin til vega frá ourworldindata.org.

Oxford University hevur eygleitt, hvussu ymiskar stjórnir kring heimin hava gjørt í sambandi við Covid-19 kreppuna. Við støði í hesum er gjørdur ein vísari, sum ger tað møguligt at samanbera, hvussu strong aftursvarini hjá myndugleikum hava verið til farsóttina. Vísarin byggir á níggju indikatorar. Hesir eru: skúlastongsul, stongsul av arbeiðsplássum, avlýsing av almennum tiltøkum, avmarkingar á hvussu nógv kunnu savnast, stongsul av almennum flutningstænastum, sóttarhaldsreglur, almenn upplýsingarátøk, avmarkingar á innanríkisferðing og avmarkingar á uttanríkisferðing. Hesir indikatorar verða mettir at kunna benda á, hvussu frítt fólk hava kunnað livað í ymiskum samfeløgum gjøgnum kreppuna.

Í Føroyum hevur í stóran mun verið stýrt við tilmælum samanborið við onnur lond, og tí kunnu vit spyrja, um tað gevur meining at samanbera við onnur lond í hesum sambandi. Hinvegin ber eisini til at taka tilmælini sum eitt dømi um, at stýringin hevur verið minni strong í Føroyum enn aðrastaðni. Skúlastongsil og ferðabann vóru tó ikki stýrd við tilmælum í Føroyum. Í ávísum tíðarskeiðum varð mælt til, at fólk arbeiddu heima, um hetta kundi lata seg gera og gav meining í sambandi við virksemið hjá arbeiðsplássinum. Formliga gjørdu arbeiðspláss sjálvi av, um tey sendu fólk til hús at arbeiða. Tí ber sannlíkt væl til at samanbera strangleikan í Føroyum við strangleikan í øðrum londum, eins og er gjørt í strangleikavísaranum. Sum vit síggja í Mynd 3, er føroyska strikumyndin (niðast í miðjuni) yvirhøvur lægri enn í hinum londunum.




Hetta bendir á, at sum heild hava átøkini hjá myndugleikunum ávirkað gerandisdagin hjá borgaranum minni í Føroyum enn aðrastaðni.

Triðja parametrið, sum nevnt varð fyrst í hesum parti, hevur eisini at gera við ávirkan á borgarar, men snýr seg heldur um hugburð hjá teimum til tiltøk enn til skjalprógvað andlát ella faktuellar avmarkingar í samfelagsvirksemi og gerandis-degi.

Fatanin hjá føroyska borgaranum gjøgnum Covid-19 tíðarskeiðið stuðlar upp undir niður-støðuna um, at virksemi og gerandislív í Føroyum hevur verið lutfalsliga lítið ávirkað av kreppuni.

Kanningar á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya vísa, at fólk yvirhøvur vóru nøgd við tey tiltøk og tey tilmæli, sum myndugleikarnir settu í verk.[3] Mynd 4 niðanfyri vísir, at frá byrjanini av kreppuni og til og við á sumri 2021 helt ein stórur meiriluti av Føroya fólki, at tiltøkini hjá myndugleikunum vóru hóskandi. Undantakið kann tó sigast at vera móti endanum á kreppuni, á heysti 2021, tá ið Omikron fråbrigdið hevði við sær, at tilburðirnir vuksu sera nógv, og fleiri enn áður (40 prosent) hildu, at gjørt var ov lítið fyri at basa farsóttini. Viðvíkjandi ávirkan á gerandisdagin hjá fólki vóru tað tó gjøgnum alt tíðarskeiðið sera fá, ið hildu, at gjørt var ov nógv viðvíkjandi tiltøkum móti Covid-19.

3 Skorini, H. og Albinus, H (2022). Pandemien i Nordatlanten: Hvordan covid-19 har forenet en polariseret mikronation – og hvordan velkendte konflikter stadig ulmer. *Politica*, 54. árg., nr. 4, s. 364-388. https://tidsskrift.dk/politica/article/view/134833/179676




**Mynd 4** Fimm kanningar frá apríl 2020 til oktober 2021, har spurt verður "Hvat heldur tú um tiltøkini, ið føroyska samfelagið sum heild hevur sett í verk í sambandi við korona-farsóttina?" Kelda: Skorini & Albinus (2022), Søgu- og samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya.




**Mynd 5** Spurnakanning í apríl 2021. Spurningur: "Í sambandi við upplating hevur verið neyðugt at taka atlit til tað heilsufakliga og til áhugamálini hjá vinnuni. Hvussu heldur tú, at javnvágin hevur verið millum hesi atlit í Føroyum?" (Kelda: Løgmansskrivstovan).

Løgmansskrivstovan gjørdi eina aðra spurnakanning í apríl 2021, sum vendi sær meira ítøkiliga til javnvágina millum heilsufaklig atlit øðrumegin og vinnulig atlit hinumegin, og hvat fólk hildu um hesa javnvág. Meginparturin av teimum spurdu helt javnvágina vera hóskandi, ein fjórðingur segði seg ikki vita, og restin helt annaðhvørt, at vinnulig atlit ella heilsufaklig atlit vigaðu ov nógv í avgerðunum (sí Mynd 5).

Tað ber sostatt til at staðfesta, við útgangsstøði í andlátum, strangleika og fatanini av stýringini millum borgarar, at tað hevur gingið lutfalsliga væl í Føroyum gjøgnum Covid-19 kreppuna. Kortini er neyðugt at fara í dýpdina við smálutunum í stýringini og at finna út av, hvat eydnaðist væl, og hvat eydnaðist illa sambært teimum, sum vóru við til at handfara kreppuna.

# Hvussu eftirmetingin er gjørd

Løgmansskrivstovan fór undir at eftirmeta Covid-19 kreppuna á vári í 2022. Avgjørt varð, at ein skilagóður framferðarháttur var at hoyra viðkomandi stovnar, fyritøkur og feløg.

Eitt spurnablað (Skjal 1 í ískoytispartinum) varð sent út, og eftirmetingin byggir á 33 svarskriv og tríggjar munnligar hoyringar við støði í hesum spurnabløðum. Í nøkrum førum hevur viðkomandi hoyringarpartur sent víðari til aðrar. Undirvísingarstýrið hoyrdi skúlar, Fakfelagsráðið fakfeløg, Kommunufelagið kommunalar stovnar og Vinnuhúsið vinnugreinafeløg. Hesi gjørdu eina meting av, hvør og hvussu nógvir undirliggjandi stovnar/feløg skuldu fáa spurnablaðið. Í ávísum førum hevur verið neyðugt at gjørt munnligar hoyringar. Tey, sum hava givið íkast til eftirmetingina, eru:

| Tilbúgving og heilsa | Myndugleikar | Undirvísing |
|---|---|---|
| Farsóttarnevndin | Kommunufelagið | Runavíkar Kommunuskúli |
| Landslæknin | Almannamálaráðið | Sands Skúli |
| Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu | Fíggjarmálaráðið | Skúlin á Fossánesi |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Heilsumálaráðið | Skúlin á Giljanesi |
| Sjúkrahúsverkið | Løgmansskrivstovan | Skúlin á Skúlatrøð |
| Almannaverkið | Lógartænastan | Eysturskúlin |
| Heilsutrygd | Umhvørvis- og vinnumálaráðið | Tvøroyrar Skúli |
| Kringvarp Føroya | Uttanríkistænastan | Miðnám á Kambsdali |
| | | Miðnámsskúlin í Suðuroy |
| | | Glasir |
| | | Fróðskaparsetur Føroya |

| Fakfeløg og felagsskapir | Fyritøkur | Vinnugreinafeløg |
|---|---|---|
| Heilsuhjálparafelagið | Atlantic Airways | Reiðarafelagið fyri Handilskip |
| Listafólkasambandið | Smyril Line | Ferðavinnufelagið |
| Starvsfelagið | Vága Floghavn | |
| Reyði Krossur Føroya | Thetis | |

At júst hesir 37 hoyringarpartar hava givið sítt íkast til eftirmetingina merkir ikki, at aðrir partar ikki eisini kundu sagt ymiskt áhugavert um Covid-19 stýringina. Mett verður kortini, at innsavnaða tilfarið er nøktandi og umboðandi fyri føroysku stýringina. Løgmansskrivstovan, sum fremur eftirmetingina, hevði ein avgerandi leiklut, og tí inniheldur eftirmetingin eisini hoyringarsvar haðani.

Hoyringarpartarnir eru ymiskir, og tað er teirra virksemi eisini. Nógvir spurningar eru ikki líka viðkomandi fyri øll, og tí hevur endamálið ikki verið at gera hagtalsgreining við støði í svarunum. Spurningarnir hava fyrst og fremst verið til íblástur hjá svargevunum fyri at fáa eitt so hóskandi svar sum gjørligt viðvíkjandi teirra í virksemi og leikluti í samfelagnum.

Tilfarið, sum eftirmetingin byggir á, er rúgvumikið. Alt upprunatilfarið er tøkt í skjali 3 í ískoytispartinum til eftirmetingina, sum kann finnast á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni lms.fo undir "kunning." Í tilgongdini var neyðugt at laga svarskrivini til, at stytta, umseta og sjóða saman fyri at kunna taka samanum og greina tilfarið. Samanskrivaðu hoyringarsvarini kunnu lesast í skjali 2 í ískoytispartinum.


VS 106
DM 818

# Eftirmeting – lærdómar og niðurstøður

Covid-19 kreppan vísti okkum, hvussu politiska skipanin, saman við øðrum, bar seg at, tá ið alt samfelagið varð lagt undir sera stórt og førdømisleyst trýst.

Tá ið Covid-19 kreppan rakti í mars 2020, vísti hon seg skjótt at vera nógv meir enn ein heilsukreppa. Kreppan rakti allar stovnar, allar fyritøkur og øll feløg í Føroyum í størri ella minni mun. Kreppan ávirkaði ymiskar geirar á ymiskan hátt í eitt tvey ára tíðarskeið, og summastaðni merkjast avleiðingarnar framvegis. Í hesi eftirmeting eru 37 aktørar komnir til orðanna fyri at lýsa stýringina.

## HEILSUFAKIÐ Í MIÐDEPILIN

Hóast talan var um umfatandi samfelagskreppu, var lítil ivi um, at tað fyrst og fremst var orsakað av heilsuvandanum, sum kom við Covid-19 virusinum. Tí var tað ikki løgið, at epidemiologisk og onnur heilsufaklig sjónarmið blivu gerandiskostur í almenna orðaskiftinum. Brádliga fingu millum annað Farsóttarnevndin, Landslæknin og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Koronaráðgevingin) væl sjónligari leiklut í samfelagnum, enn tey høvdu undan farsóttini. Tey vóru avgerandi bæði fyri politisku ráðgevingina og fyri almennu upplýsingina gjøgnum alla kreppuna. Fyrstu tíðina, og eisini seinni undir kreppuni, var heilsuøkið í fokus, tí at tað gjørdist eitt høvuðsendamál at halda smittutrýstinum niðri, so at Sjúkrahúsverkið ikki bleiv ovbyrjað. Fremsta raðfesting var at forða fyri, at smitta kom inn um sjúkrahúsgátt, og at smittutrýstið ikki bleiv so stórt, at tað tók óneyðuga orku burtur frá aðrari sjúkuviðgerð. Veruleikin var tíverri, at nógv virksemi á sjúkrahúsunum, sum var mett at kunna bíða, varð útsett. Undantakið var, tá ið serlæknar mettu, at okkurt ikki kundi bíða, til dømis krabbameinsviðgerð.

## ALMENNA UPPLÝSINGIN ALTUMRÁÐANDI

Fleiri svar leggja dent á, at greið, skjót og hóskandi almenn upplýsing hevur altumráðandi týdning í eini kreppu, sum er so umfatandi, torskild og fleirdimensjonell, sum Covid-19 kreppan var. Sum Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu nevnir, so minkaði almenna samskiftið gjøgnum miðlarnar um iva, ótta og tvístøður, sum annars høvdu kunnað stungið seg upp.

Løgmansskrivstovan samskipaði stóran part av upplýsingini og vísir á, at tíðindafundir gjørdust afturvendandi amboð, tá ið áherðsla skuldi leggjast á ein boðskap. Fróðskaparsetur Føroya leggur dent á, at samskifti í slíkum støðum má vera avgjørt, greitt og empatiskt, tað vil siga, at kunningin má taka útgangsstøði í upplivingini hjá áhoyraranum. Øvugt kunnu falskunning og falstíðindi vera líka oyðileggjandi, sum góð kunning er savnandi.

## KANNINGARORKA Í HEIMSFLOKKI

Sermerkt fyri Føroyar var, at kanningarorkan var óvanliga stór gjøgnum tað mesta av Covid-19 kreppuni samanborið við onnur lond. Hetta var fyri stóran part orsakað av tí tilbúgving, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur í sambandi við fiskasjúkur, og sum gjørdi tað skjótt at laga skipanina til at kanna fyri Covid-19. Stóra kanningarorkan var eisini orsakað av samstarvinum, sum politiska skipanin fekk við Thetis í juni 2020 um at pota og greina uppaftur fleiri koronusýni og við Smyril Line um at standa fyri logistisku uppgávuni at fáa fólk gjøgnum bíðirøðirnar á Eystaru Bryggju og at menna eina



kt-bíleggingarskipan. Gjøgnum tað mesta av tíðarskeiðnum hevði Sjúkrahúsverkið sjálvandi eisini ein lyklaleiklut í kanningarvirkseminum. Kanningarnar vórðu streymlinjaðar, so hvørt sum betri mannagongdir og betri kanningarstøð vóru funnin.

Góðu umstøðurnar at kanna fyri Covid-19 høvdu við sær, at Føroyar kundu halda fram við eini avbyrgingarstrategi í 2020, hóast flestu onnur lond, eisini Danmark, steðgaðu við hesum í einum tíðarskeiði. Í Føroyum var vilji og møguleiki til tess, tí kanningarorkan var millum heimsins størstu eftir fólkatalinum. Hetta gjørdi, at sonevndu myrkatølini vóru smá, sum gjørdi tað møguligt hjá landslæknanum at halda neyvt eyga við smittuketum gjøgnum næstan alla kreppuna. Fleiri hoyringarpartar vísa á, at tað var rætt at fremja nógvar kanningar, serliga í tíðarskeiðum við stórum smittutrýsti.

Hetta hevur uttan iva verið ein høvuðsorsøk til, at kreppan lutfalsliga ikki rakti so meint í Føroyum. Hinvegin svarar Smyril Line, sum skipaði fyri kanningum á Eystaru Bryggju, at sum land kannaðu vit alt ov nógv frísk fólk, og hildið verður, at myndugleikarnir valdu dýrastu loysnina. Víst verður á, at landið átti fyrr at havt umhugsað snarkanningar sum góðkendan kanningarhátt, tí hetta varð gjørt um alt Evropa.

## TILMÆLI HELDUR ENN LÓGIR

Frá byrjan vóru ivamál um heimildir í føroyskari farsóttarstýring. Farsóttarøkið var á donskum hondum, og tí skuldi greiða fáast á markamótum millum danskar og føroyskar myndugleikar. Arbeitt varð við møguleikanum at seta í verk ríkislóg fyri at fáa heimildir, men tá ið av tornaði varð gjørt av at arbeiða við tilmælum heldur enn lógum.

Fleiri av hoyringarpørtunum hildu, at tað riggaði sum heild væl, at landsstýrið gjørdi tilmæli heldur enn lógir og boð. Kortini eru nógvir hoyringarpartar, sum gera vart við, at í ávísum førum var torført at tulka tilmælini. Her skal nevnast, at alternativið ikki varð roynt undir kreppuni, og tí er einki veruligt grundarlag at samanbera lógir og tilmæli í eini undantaksstøðu sum hesari.

Fleiri av teimum, sum høvdu til uppgávu at seta tilmæli í verk, vísa á, at tey fylgdu tilmælunum, sum um tey vóru lógir, og at tilmælini loyvdu ávísum smidleika í sambandi við, at tey vórðu tulkað og síðani sett í verk. Smidleikin kundi ofta vera ein fyrimunur, tí økini eru ymisk, og tí er tað ofta best at lata tey, sum dagliga arbeiða á økinum, laga tilmælini til ítøkiliga veruleikan á tann hátt, sum tey halda vera skilagott. Hinvegin kundi smidleikin eisini vera ein vansi, tí tulkingar-møguleikarnir vóru nógvir, og harvið slapp ovasti myndugleikin undan ábyrgd og í staðin varð hon løgd á stovnin ella fyritøkuna, sum síðani skuldi standa til svars fyri møgulig mistøk.

Tey, sum serliga vísa á trupulleikar við at tulka tilmælini, eru skúlar, dagstovnar, eldraøkið og Almannaverkið. Í høvuðsheitum stovnar, sum hava undirvísing, uppaling og umsorgan sum høvuðsuppgávu. Her tykist avbjóðingin hjá fleiri at hava verið, at landsstýrið tók stig til, *at* ávíst virksemið skuldi niður í ferð, men at stovnurin sjálvur mátti finna upp á leiðreglur um, *hvussu* hetta skuldi gerast. Hetta var í fleiri førum ein sera torfør uppgáva, serliga tá ið samfelagið fór upp og niður í ferð fleiri ferðir. Lítil ivi er um, at tað var nógv einfaldari at lata aftur enn at lata upp aftur. Tá ið samfelagið skuldi lata upp aftur, skuldi tað gerast stigvíst og eftir umstøðunum, og hetta var ein avbjóðing. Fyri at taka fólkaskúlarnar sum dømi kann vera trupult í praksis at tryggja frástøðu millum børn í einum skúlagarði. Líknandi avbjóðingar við at seta tilmæli í verk vóru eisini á øðrum økjum.

Koronaráðgevingin, sum kom at liggja hjá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Arbeiðseftirlitinum, fekk ein týdningarmiklan leiklut at ítøkiliggera og ráðgeva fyritøkum, feløgum, stovnum og øðrum í sambandi við almennu tilmælini. Sambært Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum virkaði Koronaráðgevingin væl, tí hon var millumlið millum borgaran øðrumegin og samskipandi myndugleikan hinumegin. Sera nógv lata væl at hesi loysnini, og Koronaráðgevingin viðmerkir, at tey allarflestu fylgdu teirra tilmælum.

At Føroyar brúktu tilmæli heldur enn lógir er eitt dømi um, at Føroyar høvdu eina sjálvstøðuga og ofta heldur øðrvísi tilgongd til kreppuna enn onnur lond. Millum annað sigur landslæknin, at hóast landslæknaembætið sum útgangsstøði fylgir donskum tilráðingum, so bar til, við støði í egnum eygleiðingum og upplýsingum úr føroyska granskingarumhvørvinum, at gera øðrvísi mannagongdir og geva øðrvísi tilmæli enn tey, sum vóru galdandi í Danmark.

Løgmansskrivstovan, sum stóð fyri at orða tey flestu tilmælini, nevnir í sínum hoyringarsvari, at hóast tað virkaði væl við tilmælum, so hevur óttin fyri farsóttini óivað elvt til, at undirtøkan fyri teimum var so góð. Tí kann fara at vera neyðugt við eini rammulóg í sambandi við líknandi kreppur í framtíðini, um sama virðingin fyri vandanum ikki er til staðar. Seinasta tíðin við Omikron bendir á hetta sama, at ræðslan ella virðingin fyri eini kreppu ella eini avbjóðing millum borgararnar hevur stóran týdning fyri, hvussu væl stýringin kann eydnast. Landslæknin nevnir, at eftir at stór undirtøka hevði verið fyri almennu tilmælunum gjøgnum mesta av tíðar-skeiðnum, so broyttist hetta við Omikron, tá ið tað bleiv torførari at fáa fólk at halda tilmælini.

## COVID-19 LÓGGÁVA

Hóast stýrt varð í høvuðsheitum við tilmælum, vórðu fleiri lógir gjørdar sum beinleiðis avleiðing av farsóttini. Týdningarmestu av hesum vóru hjálparpakkarnir. Longu áðrenn samfelagið fór niður í ferð, hevði Umhvørvis- og Vinnumálaráðið gjørt uppskot til hjálparpakkar.

Hjálparpakki 1 hevði sera stóran týdning, tí hann gjørdi tað møguligt hjá starvsfólki at fara heim við løn. Um hann ikki var settur í verk, hevði tað havt við sær hópuppsagnir um alt samfelagið, og tí skapti hjálparpakkin ró. Onkrar avbjóðingar vóru kortini. Listafólkasambandið vísir millum annað á, at teirra limir ikki fingu lut í hjálparpakkanum alt fyri eitt, og Starvsfelagið vísir á, at upphæddin til tey á privata arbeiðsmarknaðinum var ov lítil

í mun til lønina, og at fólk høvdu stóran inntøkumiss. Hjálparpakki 2 vendi sær til smærri fyritøkur og hjálparpakki 3 til ferðavinnufyritøkur, sum vóru serliga hart raktar.

Lógartænastan vísir á, at ávís kreppulóggáva, sum var samtykt undir Covid-19 kreppuni, kann hava løgfrøðiligar avbjóðingar við sær, við tað at vikið varð frá vanligum grundreglum. Í stuttum snúgva hesar avbjóðingarnar seg um, at summar Covid-19 lógir høvdu virknað aftur í tíð, sum gongur ímóti grundleggjandi meginreglum í einum rættarsamfelag, og at fleiri samtyktar Covid-19 lógir høvdu sólsetursásetingar, sum kunnu elva til løgfrøðiligt tómrúm, eftir at lógin av sær sjálvari fer úr gildi. Eisini verður víst á, at lóggávuvaldið í Føroyum er í løgtinginum, men at farsóttin gav í ávísum førum víðar heimildir til landsstýrismenn at áseta reglur í kunngerð. Lógartænastan vísir eisini á, at vikið varð fleiri ferðir frá vanligum mannagongdum, tá ið fyrireikingararbeiðið var styttri enn vanligt, og stundir ikki vóru at senda lóggávu til ummælis.

## AT VERJA TEY ELDRU OG SJÚKU

Eldraøkið fylti nógv hjá myndugleikunum og í almenna orðaskiftinum í fyrstani, tí Covid-19 skjótt varð eyðmerkt sum ein sjúka, ið var vandameiri fyri eldri borgarar enn yngri. Sama var galdandi fyri fólk, ið høvdu ringa heilsu, ella sum orsakað av ávísum kroniskum sjúkum vóru serliga útsett. Fyri eldri og heilsuveikar borgarar var hetta ein serliga avbjóðandi tíð. Innanhýsis mannagongdir á stovnum vórðu nógv broyttar, sum hevði við sær, at borgarar/búfólk ikki kundu fáa vitjan, og nógv avvarðandi klagaðu um vitjanaravmarkingar á ellisheimum, í sambýlum og búfelagsskapum.

Heilsuhjálparafelagið vísir millum annað á, at fyri starvsfólk merkti henda støðan, at tey máttu skipa alt arbeiði og alla frítíð á ein hátt, sum ikki kundi hava við sær, at tey tóku smittuna við sær inn á stovnarnar. Tey máttu liva, sum um tey vóru í sóttarhaldi alla tíðina. Heldur ikki var tað lætt hjá starvsfólkum at vera vitni til, at tey, ið búðu á ymisku heimunum, ikki fingu vitjan í langa tíð.

Kommunufelagið vísir harafturat á, at eingin heilsufakligur myndugleiki hevði ábyrgd av eldraøkinum, og at tað var sera óheppið, at eldraøkið ikki var umboðað í farsóttarnevndini. Einki fyrilit var fyri eldraøkinum í ávísum avgerðum hjá nevndini.

## KJARNUVIRKSEMI RAÐFEST

Hóast kreppan rakti ymiskt virksemi á ymiskan hátt, so høvdu næstan allir hoyringarpartar í felag, at ymiskt virksemi, sum ikki var alneyðugt, mátti skerast burtur fyribils, so at dentur kundi leggjast á kjarnuvirksemi. Summi upplivdu, at neyðugt var við eini munandi effektivisering og niðurlaging av ávísum virksemi. Hetta merkti, at viðgerð bleiv drúgvari, svartíðir og bíðitíðir gjørdust longri, og fløskuhálsar komu í veiting av ávísum vørum og tænastum.

Innan fyri tilbúgving og heilsu broyttist mesta virksemið munandi orsakað av farsóttini, og her varð nógv orka brúkt til beinleiðis koronuhandfaring. Fyri summar stovnar hevði kreppan við sær ógvusliga øking í ávísum virksemi. Hetta gjørdi seg serliga galdandi fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Sjúkrahúsverkið, har starvsfólk máttu renna væl skjótari enn vanligt undir Covid-19 kreppuni. Fyri næstan allar almennar stovnar var galdandi, at tænastan versnaði meira ella minni í ávísum tíðarskeiðum. Hetta veri seg viðvíkjandi heilsu, undirvísing, eldrarøkt, barnaansing ella øðrum.

## TILLAGING OG SAMSTARV

Flestu hoyringarpartar hava onga ítøkiliga tilbúgving havt, fyrr enn farsóttin rakti. Fleiri siga seg tó hava verið sera skjót at laga seg til nýggju umstøðurnar, tá ið Covid-19 fór at gera um seg í Føroyum, og samfelagið fór niður í ferð fyrstu ferð. Tað er sera ymiskt, hvussu virksemið ymsastaðni varð ávirkað av Covid-19. Flest øll arbeiðspláss máttu umskipa arbeiðið á onkran hátt. Nógv fólk arbeiddu heima, ferðingin uttanlands var munandi minni, og yvirhøvur var torførari at fremja ávíst virksemi. Ítøkiliga sipar tillagingin til, at fólk framdu nýggjar uppgávur ella hugsavnaðu seg um alneyðugar arbeiðsuppgávur og yvirhøvur funnu loysnir til trupul-

leikar, sum áhaldandi stungu seg upp orsakað av farsóttini. Neyðugt var hjá mest sum øllum at gera innanhýsis mannagongdir – um fyribyrging av smittu millum starvsfólk, toymisarbeiði, frástøðu, tal á fólki fyri hvørt rúm, spritting, atgongd til bygningar o.s.fr.

Tætt knýtt at økta tillagingarevninum millum leiðslur og starvsfólk er, at alt formligt og óformligt samskifti og fundarvirksemi vaks sera nógv hjá flestu arbeiðsplássum, serliga hjá myndugleikum og almennum stovnum. Hetta var neyðugt, tí umstøðurnar vóru ókendar og ótryggar. Tørvurin gjørdist størri at tosa saman bæði nógv og ofta, og tí gjørdist samskipandi leikluturin hjá myndugleikum, kommunum og aðalráðum eisini nógv virknari undir Covid-19 kreppuni enn undir vanligum umstøðum. Í fleiri førum merkti kreppan eisini, at myndugleikar máttu broyta karmarnar fyri tey økini, sum tey ráddu yvir. Vøksturin í samskiftinum gjørdi seg bæði galdandi innanhýsis og uttanhýsis í føroyska samfelagnum og til partar uttanlands. Í nógvum førum kom samstarv í lag millum organisatiónir, deildir, eindir og einstaklingar, sum ikki var til framman undan kreppuni. Yvirhøvur lata næstan allir hoyringarpartarnir sera væl at samstarvinum við aðrar partar undir kreppuni.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum var í Føroyum talan um sera "agila", tað vil siga kringa og liðiliga skipan, tað vil siga, at hon lagaði seg til umstøðurnar sera skjótt, og skipanarligu mørkini vóru ikki líka avmarkandi sum uttanlands. Kortini máttu tey, sum høvdu ábyrgd, tosa saman alla tíðina. Her verður eisini spurningur settur, um ein neyv og niðurskrivað tilbúgving við støði í einum hugsaðum dømi hevði verið til so nógva nyttu, tá ið umstøðurnar vóru so serligar og broyttust so skjótt.

Fleiri hoyringarpartar nevna, at Covid-19 kreppan hevði við sær munandi førleikamenning, virðismiklar royndir og betraðar mannagongdir, sum framvegis eru galdandi, ella sum kunnu setast í verk í serligum støðum. Dømi um hetta eru millum annað tekniska førleikamenningin sum fjarlesturin á undirvísingarøkinum hevði við sær, og fyriskipan av arbeiði heimanífrá.

## BAKKAST FYRI STARVSFÓLKATRIVNAÐIN

Meðan sera nógvir hoyringarpartar rósa sínum starvsfólkum fyri dugnasemi og evnini at laga seg til nýggjar umstøður undir koronakreppuni, so høvdu broyttu umstøðurnar eisini negativar avleiðingar fyri starvsfólkatrivnað, serliga har starvsfólk kundu lýsast sum front-line starvsfólk. Tá ið smittutrýstið var stórt, serliga undir seinastu Omikron bylgjuni, avrikaðu hesi starvsfólkini óvanliga nógv. Undir seinastu bylgjuni vóru sera nógv fólk í sóttarhaldi, og tí var arbeiðsbyrðan sera stór, og fleiri vórðu rakt av strongd. Sálarliga arbeiðsumhvørvið var tungt, og hetta var serliga galdandi í vælferðarstørvum, til dømis á eldraøkinum og við undirvísing. Sjúkrahúsverkið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan leggja tó størstu áherðsluna á henda trupulleikan. Tað seinna nevnir í sínum svari, at avleiðingarnar eisini merktust langt aftaná, at kreppan var yvirstaðin.

Ein annar stórur trupulleiki, sum leggur seg upp at trivnaðinum, er manglandi arbeiðsmegi, sum summi arbeiðspláss eisini høvdu avbjóðingar av. Fleiri arbeiðspláss upplivdu starvsfólkatrot, sum hevði við sær, at verandi starvsfólk í nógvum førum vórðu noydd at avrika eyka nógv, sum í fleiri førum elvdi til strongd ella aðrar avleiðingar fyri starvsfólk.

Sjúkrahúsverkið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan máttu økja nógv um ávíst virksemi, tá ið kreppan rakti, og tí var neyðugt at seta nógv nýggj fólk í starv í stuttum tíðarbili. Hetta elvdi til avbjóðingar, og tí eftirlýsa hesir stovnar liðiligari treytir fyri tíðaravmarkað starvsfólk í kreppustøðum í framtíðini. Landslæknin og Thetis øktu sera nógv um sítt virksemi undir kreppuni, men Landslæknin fekk hjálp frá danska embætisverkinum, t.v.s. løgregluni og Styrelsen for Patientsikkerhed, og Thetis sum privat fyritøka hevði ikki somu avmarkingar sum almennir stovnar í sambandi við starvssetanir.

## UNDIRVÍSING Í NÝGGJUM HAMI

Frá byrjan var største avbjóðingin hjá undirvísingarverkinum at røkka øllum næmingum við fjarundirvísing. Hetta merkti bæði næmingar, starvsfólk og avvarðandi. Eisini var ymiskt, hvussu nógv varð gjørt burtur úr skúlanum í heimunum, og tí gjørdist munurin millum ressursusterkar og ressursuveikar familjur sjónligari í tíðarskeiðnum. Í fólkaskúlanum gekk kreppan út yvir kreativu fakini. Hinvegin vísa allir skúlar á stórar fyrimunir við styttri tímatalvum: at næmingar blivu meira motiveraðir, at tímarnir blivu effektivari o.s.fr.

Vikarkvotan rakk ikki, tá ið nógv starvsfólk vórðu rakt av sóttarhaldi. Tað merkti, at nógvir lærarar máttu arbeiða væl meir enn vanligt. Summi vóru ónøgd við, at ókoppsett vóru ofta í sóttarhaldi, meðan koppsett tóku eitt eyka tak.

Miðnámsskúlarnir og Fróðskaparsetrið vísa á somu avbjóðingar við fjarundirvísing sum fólkaskúlarnir. Niðurstøðan er greið: Fjarundirvísing virkaði lutfalsliga væl, men hevði fleiri avbjóðingar við sær við læringini. Hetta slagið av undirvísing verður ongantíð líka gott sum undirvísing á staðnum.

Á miðnámi gekk kreppan út yvir sosiala lívið, serliga hjá næmingum. Summir flokkar, sum byrjaðu í august 2020, eru enn merktir av ringu byrjanini. Fleiri námsferðir vórðu avlýstar, sum var harmiligt fyri næmingarnar.

Niðurstøðurnar innan fyri undirvísingina líkjast teimum, sum longu eru nevndar omanfyri. Skúlarnir hugsavnaðu seg um kjarnuvirksemi, sum er undirvísing, og skipaðu seg annars í mun til umstøðurnar og smittuvandan. Summi starvsfólk og næmingar høvdu sálarligar avbjóðingar av koronukreppuni, summi vórðu rakt av strongd og sjúkrameldað.

Høvuðslærdómurin av kreppuni tykist at vera, at relatiónir millum lærarar og næmingar og næmingarnar sínámillum hava avgerandi týdning fyri læringina.

## VINNULIGA GRUNDARLAGIÐ HVARV

Fyri ávíst vinnuvirksemi hevði kreppan við sær, at grundarlagið undir virkseminum hvarv í longri tíðarskeið. Hóast hjálparpakkarnir bøttu um trupulleikarnar, hevur hetta kortini havt stórar fíggjarligar avleiðingar fyri nógv fólk, sum starvaðust í hesum vinnum. Ilt er at siga, júst hvussu stórur fíggjarligi missurin hevur verið og hjá hvussu nógvum húsarhaldum, men tað er kortini vist, at tey, sum liva av millum annað ferðavinnu og framførslulist, vórðu harðast rakt undir kreppuni.

At samferðslan uttanlands minkaði ógvusliga, tá ið kreppan rakti, hevði við sær, at virksemið hjá allari ferðavinnuni steðgaði. Framtíðin var ógreið og ørkymlandi hjá starvsfólki. Tað bleiv neyðugt at minka starvsfólkahóparnar, og nógv fólk vórðu søgd úr starvi.

Somuleiðis steðgaði alt útinnandi virksemi á listaøkinum upp, tí tað bar ikki til at hava framførslur og framsýningar. Tey, sum arbeiða fulla tíð sum listafólk, vórðu serliga hart rakt. Summi á tónleikaøkinum vóru heilt illa fyri. Tíðarskeiðið var merkt av ótryggleika, tí tiltøk ofta vórðu brádliga avlýst. Summi fingu sær annað arbeiði, men tað bar ikki til hjá øllum. Fleiri mangladu pengar til eitt nú mat og leigu. Relatiónin til maka og børn var undir trýsti. Lítil ivi er um, at børn hava liðið undir, at inntøkugrundarlagið hjá øðrum ella báðum foreldrum varð rivið burtur í einum.


L'ORÉAL
PARIS
PROFESSIONNEL

